Filadelfia
„Himmal á jørð“

# Vakna, rist dustið av og reis teg

Es. 52,1-2: *Vakna, vakna, lat teg í styrki tína, Zion! Lat teg í hátíðarbúna tín, Jerúsalem, tú hin heilagi staður! Tí eingin óumskorin og eingin óreinur skal aftur koma inn í teg. Rist dustið av tær, reis teg, set teg í sæti títt, Jerúsalem! Loys bondini av hálsi tínum, tú hin hertikna, dóttir Zion!*

Gott nýggjár øll somul. Vit tala Guds ríku signing yvir hvønn einstakan av okkum í 2024.

Í samband við ársskifti og ríki Guds í nýggja árinum, rann seinasta talan, sum var í Filadelfia í fjør, mær í huga og síðani skriftstaðið omanfyri.

Í hesi talu, var snúningsdepilin samrøðan millum Jesus og samversku kvinnuna við brunnin. Her varð m.a. víst á, at endamálið hjá Jesusi ikki var at fordøma ella avdúka kvinnuna, tá Hann í Jóh. 4, vers 17-18 sigur: ... „Væl mást tú siga: „Eg havi ongan mann“! Tí tú hevur



havt fimm menn, og hann, ið tú hevur nú, er ikki maður tín – har segði tú satt!“ Heldur vildi Jesus vísa kvinnuni, at Hann kendi til hennara umstøður: hvussu hon varð svikin og vrakað av hesum monnum, helst tí hon ikki kundi fáa børn. Her er sostatt talan um eina kvinnu, sum var sera djúpt særd, sum hevði brúk fyri grøðing og Jesus bjóðaði henni livandi vatn – Hann bjóðaði henni grøðing. Vit síggja her, hvussu Jesus í hesi samrøðu, dregur frá kelduni, sum Hann tosar um í Jóh. 4, vers 13-14; Jesus dregur frá Pápa sínum við Heilaga Andanum – og rørir við kvinnunar persón. Her síggja vit eisini tilboðið frá Jesusi í Jóh. 7,37-38 í verki: Hin síðsta – hin stóra – dagin í høgtíðini stóð Jesus og rópti: „Um nakar tystir, komi hann til Mín og drekki! Tann, ið trýr á Meg, úr lívi hansara skulu, sum skriftin hevur sagt, renna streymar av livandi vatni.“ Jesus bjóðar kvinnuni hetta livandi vatn til fullkomna grøðing. Tað sæst at kvinnan tekur av tilboðnum, tí hon fer frá at krógva seg fyri øllum – við at fara eftir vatni, tá ongin annar var har – til at fara inn í býin at siga fólkinum frá um Jesus. Sostatt tekur kvinnan ikki bara ímóti tí livandi vatninum til grøðing, men hon letur vatnið renna úr sær til onnur at drekka av. Tí tá hon var grødd var hennara natúrliga reaktión at lata vatnið renna víðari til onnur.

Um hetta verður knýtt til versini í Es. 52,1-2, kann eisini sigast, at samverska kvinnan vaknaði í samrøðuni við Jesus. Tá hon tók ímóti tí livandi vatninum risti hon dustið av sær, loysti bondini av hálsi sínum og lat seg í styrki sína (sum hon hevði fingið frá Gudi).

Við ársbyrjan í fjør var Heilaga Andans heilsan til okkum, ikki at missa fokus av útveljing og kalli okkara, hóast útlitini rundan um okkum. Afturlítandi gevur hetta góða meining, tí tað tykist ikki sum heimstrupulleikarnir fækkaðu, samstundis sum enn eitt kríggj gjørdist veruleiki í fjør. So um vit lata okkum ávirka av heimsstøðuni er lætt at missa fokus, at gloyma, at vit eru partur av Guds ríkis loysn og at lata livandi vatnið renna úr okkum. Tó er umráðandi, at vit liva í tilvitanini um, at vit eru likam Hansara kallað til at virka Ríki Guds á jørð.

Fyri hetta árið hoyri eg hesa áheitan frá Heilaga Andanum: lat okkum rista alt dust av okkum, loysa eitthvørt band, ið forðar okkum í at liva okkara kall og útveljing út, av hálsi okkara og lata okkum í styrki okkara frá Gudi. So Hansara livandi vatn, bæði rennur í okkum og úr okkum, og so vit eru før fyri at virka í kalli okkara bæði sum samkoma og sum einstaklingar – Hansara ríki til frama og Honum til dýrd og heiður.

*AMD*



# JANUAR 2024

| | | | |
|---|---|---|---|
| Leygardagur | 6. | | **Reingerð:** Anna og co. |
| Sunnudagur | 7. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti v. breyðbróting** |
| | | Kl. 11.45 | **Barnamøti** |
| | | | Møtivertar: Fríðbjørn og Linda |
| | | | Ábyrgd/Leiðari: Sam |
| | | | Lovsongsleiðari: Tummas J., bólkur II |
| | | | Uppvørpa: Ragnar |
| | | | Ljóðbland: Sjúrður |
| | | | Tulkur: Ragnar |
| | | | Talari: Mariann |
| | | | Kaffivertar: Fríðbjørn og Linda |
| Mánadagur | 8. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin** |
| | | | Ábyrgd/leiðari: Regin |
| Leygardagur | 13. | | **Reingerð:** Conny og co. |
| Sunnudagur | 14. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti** |
| | | Kl. 11.45 | **Barnamøti** |
| | | | Møtivertar: No-omi, Marner, Hellen og Sjúrður |
| | | | Ábyrgd/Leiðari: Ása O. |
| | | | Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur I |
| | | | Uppvørpa: Ása Elisabeth |
| | | | Ljóðbland: Tummas D. |
| | | | Tulkur: Høgni |
| | | | Talari: Ása O. |
| | | | Kaffivertar: No-omi, Marner, Hellen og Sjúrður |
| Mánadagur | 15. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin** |
| | | | Ábyrgd/leiðari: Anna |
| Leygardagur | 20. | | **Reingerð:** Katy og co. |
| Sunnudagur | 21. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti v. breyðbróting – inns. til húsið** |
| | | Kl. 11.45 | **Barnamøti** |
| | | | Møtivertar: Nora, David og Kári |
| | | | Ábyrgd/Leiðari: Marner |
| | | | Lovsongsleiðari: Ingun, bólkur II |
| | | | Uppvørpa: Ragnar |
| | | | Ljóðbland: Sjúrður |
| | | | Tulkur: Ragnar |
| | | | Talari: Margret |
| | | | Kaffivertar: Nora, David og Kári |
| Mánadagur | 22. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin** |
| | | | Ábyrgd/leiðari: Hans |
| Leygardagur | 27. | | **Reingerð:** Áshild og co. |
| Sunnudagur | 28. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti** |
| | | Kl. 11.45 | **Barnamøti** |
| | | | Møtivertar: Áshild og Eyðbjørg |
| | | | Ábyrgd/Leiðari: Mariann |
| | | | Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur I |
| | | | Uppvørpa: Ása Elisabeth |
| | | | Ljóðbland: Tummas D. |
| | | | Tulkur: Høgni |
| | | | Talari: Alex |
| | | | Kaffivertar: Áshild og Eyðbjørg |
| Mánadagur | 29. | Kl. 20.00 | **Lovprísan og forbøn** |
| | | | Ábyrgd/leiðari: Hildibrandur |

Fyrivarni verður tikið fyri, at broytingar kunnu koma í skránna.

## Fráfaringarløta sunnudagin 14. jan. 24



*Eg havi verið ungur og eri vorðin gamal; men ikki havi eg sæð hin rættvísa vinaleysan ella avkom hansara leita eftir breyði.* Sálm. 37,25

Á morgunmøtinum sunnudagin 14. januar, verður fráfaringarløta fyri Tummas Jacobsen, nú hann hevur valt at leggja frá sær eftir nógv ár í leiðsluni í Filadelfia.

Sama dag abdiserar Margretha drotning – man tað vera avtalað spæl :). Vit vita tó, hvør tekur við eftir Margrethu, men hvør traðkar í skógvarnar hjá Tummasi?

Tummas byrjaði sum elstabróðir miðskeiðis í áttatiárunum. Seinni tá Kurt Christensen í 1992 valdi at fara aftur til Danmarkar, var Tummas fyrst leiðandi elsti, til Sólrún og Tummas vórðu sett sum fyristøðupar í 1994. Seinnu árini hevur hann tó verið partur av leiðslubólkinum, sum hann nú gevst í.



Eitt hevur itið áðrenn og aftaná Kurt, men nú verður tað so áðrenn og aftaná Tummas, tó bert sum parti av leiðslubólkinum, vónandi verður hann virkin á annan hátt í mong ár afturat.

Takk fyri títt trúfesti.